# Minningarorð um pápabeiggja mín

# Olaf Johansen

## 25.august 1947 – 1.desember 2010



Sum barn minnist eg, hvussu væl tú og babba vóru fyri. Fimir og sterkir, stuttligir og líkir. Tit høvdu eitt serligt tilknýti. Sum smágenta spurdi eg einaferð babba, um tað var deiligt at hava ein tvíburabeiggja, hann svaraði bert: "Veit ikki, havi ongantíð roynt nakað annað." Og so flentu vit saman. Men hevði eg spurt hann sama spurning í 1996, tá ið bæði nýruni vóru sjúk og babba mátti í dialysu, tá hevði svarið verið eitt rungandi JA! Tað er gott at hava ein tvíburabeiggja. Tí tú gavst babba annað nýrað.

Babba kundi nú liva eitt vanligt lív aftur, og vit vóru øll so glað. Hvør ein gáva at geva beiggja sínum. Ein nýggjan møguleika fyri at liva eitt vanligt lív. Takk fyri at tú gavst av tær sjálvum, fyri at hann skuldi fáa ein nýggjan møguleika. Hetta lýsir, hvussu góður tú vart við babba, og hvussu lítið, tú hugsaði um teg sjálvan.

Tó gjørdist hetta nýrað óvirkið eftir eitt hálvt ár, og babba doyði í 2003. Í 2004 rakti so sama sjúka teg, góði Olaf og um somu tíð misti tú konu tína, Randi. Tit høvdu verið gift í 34 ár. Hvør ein missur, hvør ein sorg!

Babba var sjómaður ein stóran part av mínum barnaárum, og tað kendist at tú hevði umsorgan fyri okkum. Tú komst heim til okkara og hevði áhuga í okkum. Eitt skifti arbeiddi eg á skrivstovuni á Bryggjubakka nakrar tímar um vikuna. Setti mynstringarseðlar inn í mappur og annað, sum tú ikki vildi nýta orku uppá, men sum skuldi gerast. Tí tú vildi hava skil í øllum á skrivstovuni. Har var einki at seta ein fingur á. Tá høvdu vit onkra løtu til at sita og tosa, um føroyska málið, um upplivingar, um familju, um lívið. Tú var mær ein hollur stuðul í lívinum. Babba doyði beint áðrenn Bjartur varð føddur og tú vart skjótur út á føðideildina at síggja sonin. Tá eg sá kærleika tín og gleðina um lítla Bjart, var tað ein ómetaligur uggi fyri meg. Babba var farin, men babbaba var her framvegis og kundi fylgja við í lívi okkara og síggja børn okkara vaksa til.

Takk fyri løturnar, Olaf. Takk fyri stuttligu løturnar, tær vóru mangar. Tú tosaði um gamlar Havnarmenn, ið dugdu so væl at taka til – tú tosaði um barna- og ungdómsár - ja, mangan flentu vit saman. Eisini dámdi tær so væl at lesa nærum allan skaldskap. Tær dámdi væl yrkingar. Tú og babba dugdu manga yrkingina hjá JHO Djurhuus og hjálptu mær gleðiliga við eini uppgávu um hetta skald. Tá upplivdi eg eina áður ókenda síðu av mær sjálvari. Eg upplivdi, hvussu yrkingar veruliga kunnu tala til hjartað á ein serligan hátt, og hvussu tú og babba leitaðu tykkum sálarbót í yrkingum, sangum og í skaldskapi.

Ikki vardi tað okkum, at enn ein brotasjógvur skuldi skola oman yvir teg.

Ver sterk mín sál á køldu náttarvakt,
har eingi altarljós til gudar brenna,
har hvør ein vón av fannkava varð takt,
og hjarta ongan hita meir kann kenna;
ver stór mín sál sum rúmdar kalda tøgn,
ið eina er, tá ið sloknar lívsins søgn.

Uttan ávaring og uttan grund vart tú kastaður út og náðileyst drenaður fyri orku.

Tað herjar á sakleysar, sovandi menn, -
steingið øll hurðar um nætur! -
tí rovdjórið eigur flensandi tenn,
tá ið merkist í nándini matur

Eg kenni ljótt gorrandi ravnaslag,
ið fegnast flýgur um nætur
og heldur átfund á rotnandi ræ;
tað er ormgitið níðingaslatur.

Ikki unni eg mínum argasta fígginda ta viðferð, ið tú fekk!

Hesin spurningur rungar inni í mær: Hví? Hví skuldi hetta henda tær? Hví skuldi viðkvæmi silvurstrongur tín kvettast av á henda hátt? Men so hoyri eg eina rødd:" Alt tað, sum tú ikki kanst gera nakað við – koyr tað frá tær! Tað er farið, hygg frameftir". Tað eru tíni orð, Olaf. Soleiðis segði tú við mammu, tá ið babba fór og soleiðis fanst tú styrki til at liva, hóast lívið síðstu árini mangan mundi kennast tungt, bæði til sálar og serliga til likams.

Fyri fáum døgum síðani, tá vart tú sera veikur, komu "tey á Váli" inn at syngja fyri tær. Tey sungu ein sang, ið hevur eina serliga søgu. Petur Háberg, abbi mín í móðurætt, hevði yrkt sangin til Olaf og Annu, ommu og abba tín, á silvurbrúdleypsdegi teirra. Vit sóu, at sangurin nam við kenslur tínar og í síðsta ørindi og niðurlag sang tú við:

Treystur tí skoða framá, vita, at Hann er við
Kærleiksfult hann tær fylgir, gevur tær hvíld og frið
Verðin er myrk og ótrygg – ræðist hvønn nýggjan dag
men tann sál, sum er frelst kann hvíla, trygg og glað

Undurfult og stórt er navnið Jesus
fagrari enn nakað annað navn.
Heiður til Hann, nú og gjøgnum allar ævirnar
Hetta dýra navnið trygt meg leiðir,
gjøgnum storm og myrkur, dag um dag
Inntil Hans særda hond meg førir inn í Zions stað

Harrin styrki tykkum, Guðrun og Súsanna við familjum. Góðu minnini um Olaf eru mong og geva tykkum vónandi styrki til at liva lívið í hansara anda.

Ærað veri minnið um elskaða pápabeiggja mín, Olaf Johansen.

**Katrin**

www.ebenezer.fo

SUNNUDAGSSKÚLIN

í Ebenezer er hvønn sunnudag kl. 12.00

**Øll eru hjartaliga vælkomin!**



EBENEZER



## TØKK

Vit vilja hjartaliga takka øllum fyri
hjálpsemi og umsorgan alt síðani
Sólrun gjørdist sjúk í apríl 1999.

Eisini eina hjartans tøkk frá okkum til tykkum øll
fyri sýnda samkenslu og hjálp, tá

**Sólrun E. Laksáfoss**

stillisliga andaðist og varð jarðað.

Spyrjandi vit aftur standa nú við eina grøv,
hví skal hendan unga blóman longu gerast støv?
Svarið fáa vit vist ikki nú, men einaferð
alt tað loynda fyri okkum opinberað er.
Vakrast tú av øllum blómum vart her fyri meg,
tolsemi og eyðmjúkleiki myndaðu tín veg.
Smílandi við blíðum lyndi gekst tú tína leið,
gleddi meg hvønn dag í tínum alt ov stutta skeið'.

Eftir eru minnini og væl tey verða goymd,
innast inn at hjartanum, so ei tey verða gloymd.
Sjálvt um løtan tung kann vera nú, so veit eg væl,
tá vit síggjast eg í ævir hjá tær verða skal.

*Vegna familjuna*
**Eyðun, Bárður og Páll**